# Um Vinnu-máláráðið vil



*Smoltstøðin í Hovsdali er partur av eigaraskiftinum í alingini í Suðuroy*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Faroe Farming hevur keypt alivirksemið hjá Atlantic Seafarm í Suðuroy og byrjar virksemi sítt á nýggjárinum, um Vinnumálaráðið góðtekur, at nýggja felagið fær aliloyvini hjá gamla felagnum**

ALING
*Edvard Joensen*

Eitt samtak av alifeløgum, fiskaseljarum, fóðurframleiðara og fíggingargrunnum hevur keypt sjógv- og smoltalistøðirnar hjá partafelagnum Atlantic Seafarm í Suðuroy. Treytað av góðkenningfrá Vinnumálaráðnum um flyting av aliloyvunum, fer nýggja felagið í gongd á nýggjárinum, sigur stjórin.

Í løtuni rekur Føroya Sparikassi alibrúkini, sigur Erhard Joensen, sum er settur stjóri i nýggja felagnum. Arbeitt verður við tøku hetta, sum eftir er av árinum, sigur hann. Á nýggjárinum tekur so nýggja felagið ætlandi við, og tá verður farið undir aftur aling við fullari styrki.

Talan er um alibrúkini í Froðba og á Vágs - og Lopransfirði, sum eru eitt aliøki, umframt smoltalingina í Hovi, sum er í Vatnsnesi og í Hovsdali, greiðir stjórin frá. Á smoltstøðunum er ein millión smolt, og 560.000 fiskar ganga í ringunum á sjónum.

Tá framleiðslan fer í gongd av álvara, verður miðað eftir at taka hálvaaðru millión fiskar ella eini 6.000 tons árliga, sigur Erhard Joensen.

Í dag er bara fiskur í ringunum á Vágsfirði og í Lopra. Ringanrir í Froðba eru tómir í løtuni, sigur hann.

Fiskurin, sum tikin verður, verður arbeiddur á virkinum hjá Suðurlaks í Vági. Tað er gamla virkið hjá Polarfost.

Aling í Suðuroy verður mangan sett í samband við navnið Heri Hjelm. Men hann er ikki við í hesum samtakinum, sum nú hevur keypt alingina, sigur Erhard Joensen.

Partafelagið Faroe Farming er stovnað við 26 milliónum krónum í partapeningi. Alt er føroyskur peningur,og tað er tilvitað, at so er, sigur Erhard Joensen.

Hann undrast á, at tað mangan skal hava tókst, sum einki fekst í gongd í Føroyum uttan útlendskan kapital. Men tað er ikki so, staðfestir hann. Tað var eingin trupulleiki at fáa partapening til hetta tiltakið, sigur stjórin í partafelagnum Faroe Farming.




## Fiskifrøðingur á landsfundi fólkafloksins

TÍÐINDASKRIV
*frá Fólkaflokkinum*

Landsfundur Fólkafloksins verður leygardagin 22. november 2003 í SÍF-húsinum í Sandavági.

Gestur á landsfundinum í ár verður íslendski fiskifrøðingurin Jón Kristjansson. Hann hevur m.a. gjørt fiskifrøðiligar kanningar av føroyska økinum, bæði vegna Landsstýrið og Reiðarafelagið. Eisini hevur hann gjørt fiskifrøðiligar kanningar av Írska havinum og Norðsjónum fyri írsku og skotsku fiskivinnuna.

Jón Kristjansson er komin til aðra niðurstøðu enn altjóða havrannsóknarstovnurin ICES, og fer á fundinum at leggja fram aðra uppfatan av havinum við støði í sínum kanningum.

Landsfundurin byrjar kl. 10 og heldur áfram til kl. 17. Ábit verður um middagsleiti. Høvi verður at teknað seg til døgurðan, sum verður eftir fundin.

Øll eru vælkomin.



Ung í Føroyum 2004:

# Fyrreikingarnar eru væl ávegis

**Í vikuskiftinum 13.-15. februar 2004 skipar Norðurlandahúsið fyri triðju ferð fyri tiltakinum, Ung í Føroyum. Eivør Pálsdóttir hevur játtað at verða leiðari á tónleikaverksmiðjuni. Tey ungu fáa fyri fyrstu ferð møguleika at velja verksmiðjuna design**

UNG Í FØROYUM
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*Norðurlandahúsið skipar fyri triðju ferð fyri Ung í Føroyum í februar. Á myndini eru bæði fyrireikarar og fyrrverandi luttakarar. F.v Birita í Dali, Durita Alberg, Theodor Kapnas, Hedvig Westerlund-Kapnas, Rakel Helmsdal og Marjun Jespersen.*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Fyrireikingar til tiltakið Ung í Føroyum 2004 eru komnar væl ávegis. Vælumtókta tiltakið verður í vikuskiftinum 13.-15 februar 2004. Sum undanfarin ár, verður tað Norðurlandahúsið, ið skipar fyri stevnuni. Samskiparar fyri verkætlanini eru Rakel Helmsdal og Hedvig Westerlund-Kapnas.

Á Ung í Føroyum 2004 ber til at luttaka við fotoframsýning, tónleikabólki, sangi, mótasýning, sjónleiki, video, tekningum. málningum, yrkingum, søgum, standmyndum, dansi, ella øðrum, sum eingin hevur umhugsað at sýna fram áður.

### Triðju ferð

Hetta triðju ferð at skipa fyri Ung í Føroyum tiltakinum, og stevnan hevur verið væl vælumtókt millum tey ungu. Stevnan er ætlað øllum ungum í Føroyum í aldrinum 13 til 18 ár. Tiltakið er skipað eftir norðurlendskum leisti.

Endamálið við stevnuni er at varpa ljós á listaáhugaðan ungdóm í Føroyum. Á stevnuni fáa tey ungu høvið at sýna fram, hvør dugur er í teimum og hava eisini møguleika at fáa størri kunnleika um sítt listarliga fríðtíðarítriv

Mannagongdin er, at tey ungu velja seg inn á eina verksmiðju, har tey kunnu fáa hjálp frá viðurkendum listafólkum í Føroyum. Millum verksmiðjuleiðarar á Ung í Føroym 2004 kunnu nevnast Eivør Pálsdóttir og Hans Torgarð, sum ávikavíst fara hava leiðsluna á tónleika- og sjónleikarverksmiðjunum.

Uppgávan hja verksmiðjuleiðarunum er fyrst og fremst at vegleiða og eggja teimum ungu. Stevnan er skipað so, at fríggjadagin er ein innanhýsis framsýning hjá luttakarunum. Tey ungu skulu fyrireika eina framførslu, áðrenn tey koma á stevnuna, og hesar framførslur verða sýndar fyri hinum luttakarunum fyrsta kvøldið.

Leygardagurin og sunnudagurin eru tey ungu á teimum ymisku verksmiðjunum, har roynd listafólk leggja teimum lag á. Stevnan endar sunnudagin við einum braki, tá ein stór framsýning verður fyri almenninginum av úrslitunum frá verksmiðjunum.

### Til øll

Á Ung í Føroyum 2004 verða í alt sjey verksmiðjur. Møguleiki er fyri at velja tónleik, sjónleik, skriving, design, myndlist á teldu, dans og myndlist fyri ung við serligum tørvi. Fyrireikingarnir hava lagt seg eftir, at somu verksmiðjur ikki ganga aftur ár um ár. Í ár er Nýggja verksmiðjan hesaferð er design, sum Svanhild Strøm, sniðgevi, verður leiðari á. Hetta er fyrstu ferð, at design er við á stevnuni.

Fyrireikararnir leggja stóran dent á, at stevnan er fyri øll ung í Føroyum. Ung við serligum tørvi hava tí eisini fingið innivist á stevnuni.

### Frá luttakara til leiðara

Ung í Føroyum verður skipað á øðrum hvørjum ári. Fyrstu ferð var í 2001, og fyrr í vár var seinna stevnan. Tónleikatiltakið, Prix Føroyar, hevur báðar ferðir verið um somu tíð, tá Ung í Føroyum hevur verið fyriskipað. Fyri at sleppa undan, attiltøkini ikki renna saman aftur, hava fyrireikararnir gjørt av, Ung í Føroyum verður tey árini, sum Prix Føroyar ikki er á skránni.

Ein Prix Føroyar vinnari, Eivør Pálsdóttir, hevur eisini luttikið á Ung í Føroyum. Hon var á sjónleikarverksmiðjuni í 2001. Á Ung í Føroyum 2004 verður hennara leiklutur heldur øðrvísi. Eivør hevur játtað at verða leiðari á tónleikaraverksmiðjuni á komandi stevnuni, so tey ungu hava avgjørt nakað at síggja fram á.

### 60 lutakarar

Tað er pláss fyri í alt 60 luttakarum á Ung í Føroyum 2004. Umleið 10 ung verða á hvørjari verksmiðju. Møguleiki er hjá teimum ymisku verksmiðjunum arbeiða hvør sær ella samstarva um eitt felags úrslit.

Fyrireikararnir siga, at freistin til tilmelding er fram til 13.desember, og at tilmeldingarskjøl fáast í Norðurlandahúsinum á tlf. 317900 ella t-post. uif@nlh.fo.

# Aqua-René tekur sær av løttum í Føroyum

**Fyrrverandi Aqua stjørnan, René Dif, vitjar Føroyar í hesum døgum. Hann hevur rættiliga verið í andglettinum í donskum fjølmiðlum í seinastuni, og hann er tí komin til Føroya at slappa av. Hósdagin var hann millum annað á floti.**

FØROYAVITJAN
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Tað eru fleiri, sum hava varnast, at fyrrverandi Aqua limurin, René Dif, er í Føroyum í hesum døgum. Dimmalætting visti ikki í gjár at siga, í hvørjum ørindum kendi danin er í Føroyum

René Dif hevur seinastu mánaðirnar rættiliga verið í andglettinum í donskum fjølmiðlum, tí hann varð dømdur eina mánað fongsulsrevsing fyri at hava gjørt seg inn á fyrrverandi damuna hjá sær. Sjálvur er René framvegis sannførdur um, at hann er ósekur.

Fyrrverandi Aqua limurin hevur verið undir nógvum trýsti í Danmark, har serliga fjølmiðlarnir hava gjørt burtur úr sakarmálinum. Fyri at koma burtur frá øllum rokinum í Danmark, valdi hann at koma til Føroya at slappa av.

### Á floti

Seinnapartin hósdagin vóru René og tveir føroyskir vinmenn á floti uttanfyri Havnina. Ein skuldi trúð, at fiskimaðurin Dif ikki hevði gjørt annað alt sítt lív, tí væl lá fyri.

Fiskurin, ið var fangaður borðreiddur á Hotel Hafnia og stjórin Martin Restorff, ið var við René á floti, sigur, at fyrrverandi Aqualimurin var rættiliga stoltur av, at hann fyri fyrstu ferð fekk fisk, sum hann sjálvur hevði fingið til høldar.

### Sang fyri Guðrun

Tá Guðrun Sólja Jacobsen fyrr í ár vann finaluna í Stjerne for en aften, var tað júst René Dif, sum gestatónleikarin hetta kvøldið. Hann hevði júst givið sína fyrstu solo fløgu út, men sølan av fløguni hevur gingið alt annað enn væl.

René Dif umhugsar nú at sleppa tónleikinum heilt, og leggja alla orku í sjónleik. René er eftir øllum at døma glaður fyri Føroyar, og hann umhugsar at koma aftur hendavegin.

Fyrrverandi Aqua-stjørnan fer av landinum aftur sunnudagin

